Christmas Child:

# 2800 skógvaeskjur úr Føroyum




**Jólini 2003 tók samkoman Lívdin í Hoyvík stig til at vera við í jólatiltakinum Christmas Child, sum savnar inn jólagávur til fátøk børn. Fleiri samkomur, handlar og stovnar eru síðani komin við**

## JÓLAGÁVUR

Fríggjadagin fóru allar tær 2800 innsavnaðu jólagávurnar hjá Christmas Child av landinum.

Endamálið við Christmas Child er at skapa vón hjá børnum úti í heimi við at geva teimum eina skógvaeskju fulla av gávum og siga teimum tey góðu tíðindini um Guds kærleika.

Tiltakið gevur fólki í øllum aldri møguleika at verða við í einum trúboðanararbeiði, har serligur dentur verður lagdur á størstu gávuna av øllum, Jesus Kristus, Guds størstu gávu til menniskjuni. Eskjurnar fara væntandi til Rumænia eins og í fjør.

Fyriskipararnir takka øllum, sum hava stuðla tiltakinum, einstaklingum, stovnum, samkomum, kirkjum, sunnudagsskúlum, eldrasambýlum og einstaklingum kring alt landið, eins og Skipafelagnum fyri ókeypis flutning av eskjunum til Onglands.





*Síðan 2003 er talið á Christmas Child skógvaeskjum úr Føroyum vaksið úr 300 til 2800 í ár. Skógvaeskjurnar verða settar á plattar í pakkhúsinum hjá Skipafelagnum*

**Dagurin**

**4. november. Otto.** Ivingarsamt er, hvør hesin Otto er, men líkt er til, at sipað verður til biskupin Otto úr Bamberg, sum doyði í árinum 1139.
Navnið er týskt og merkir ríkidømi.

**5. november. Malakias,** deyður í 1148. Írskur munkur, sum varð valdur til biskup í Armagh í Írlandi. Segðist at útinna mong undurverkini. Summir halda, at sipað verður til Málaki, tann síðsta av teimum 12 smáu profetunum í Gamla testamenti. Bíbilska profetanavnið merkir mítt sendiboð

**6. november. Leonhardus**, deyður umleið ár 570. Munkur og trúboðari í Fraklandi. Hann legði ikki í at vera valdur til biskup. Kundi øll lás og allar leinkjur at loysa og gjørdist verndarhalgimenni hjá lásasmiðum og fangum. Navnið er týskt og merkir leyva og harður.




Tín stóri dagur

Takka í Sosialinum

Lesið Sosialin - so eru tit við